# VEÐRIÐ Í SYÐRUGØTU




FEBRUAR 2024

VEÐURSTOVA FØROYA

# Innihald

Syðrugøta ........ 3

Veðrið í bygdini ........ 5

Norðan ........ 7

Landnyrðingur norðan ........ 7

Landnyrðingur ........ 8

Landnyrðingur eystan ........ 8

Eystan ........ 8

Landsynningur eystan ........ 9

........ **Fejl! Bogmærke er ikke defineret.**

Landsynningur ........ 10

Landsynningur sunnan ........ 10

Sunnan ........ 11

Útsynningur sunnan ........ 11

Útsynningur ........ 11

Útsynningur vestan ........ 12

Vestan ........ 13

Útnyrðingur vestan ........ 13

Útnyrðingur ........ 14

Útnyrðingur norðan ........ 14

**Dagfesting**: 21. februar 2024

**Staður**: Garðabrekka 4 – 513 Syðrugøta

**Heimildarfólk:** Sørin S. Djurhuus v.fl.

**Viðtal við**: Hanus Kjølbro

## Syðrugøta

Syðrugøta er bygd miðskeiðis í Eysturoy – innast í Gøtuvík millum fjøll, onkur av teimum eru høg.

Gøtuvík gongur úr bygdini í landsynning. Úr eystri og upp ímóti norði á norðara armi av Gøtuvík er ein fjallarøð, roknað úr eystri ímóti norði:

- Gøtunestindur (625m) umleið 6 km eystan fyri bygdina
- Sigatindur (*í Gøtu kallaður Heimaritindur*) (612m) umleið 4 km í landnyrðing úr bygdini
- Frá Sigatindi og vestureftir ímóti Knúki (463m) er ein høg røð

Tey høgu fjøllini nær við bygdina ávirka veðrið í bygdini, og tey eru (*roknað úr suðuri*):

- Støðlafjall (517m) sunnan fyri bygdina
- Uppi á fjalli (*Hæddin*) (274m) vestan fyri bygdina
- Tyril (639m) í útnyrðing úr bygdini




Mynd 1: Kort av Eysturoy. Syðrugøta sæst í reyða kringinum

## Veðrið í bygdini

Veðrið í Syðrugøtu er tengt at ættini, sum tað er í øllum støðum í Føroyum.

Sveiggini ímillum gott og ringt veður kunnu vera stór, og bert lítil munur í ættini ger mun í veðrinum í bygdini. Ættirnar sunnan og vestan fyri bygdina hava góða verju, tá ið lítið er av vindi, men er vindur, kann hann gerast ójavnur við hørðum hvirlum.

Ímóti eystri er størsta í víkin landinum, og bygdin liggur opin ímóti havinum.

Fyri at fáa greiði á hvussu veðrið er á teimum ymsu ættunum í Syðrugøtu, fekk undirritaði samband við Sørin Djurhuus (**SD**), fráfarnan tilbúgvingarleiðara. **SD** fekk samband við 11 úr Syðrugøtu, sum vita um veðrið í Syðrugøtu.

Teir 11 eru:

- Tummas Thomsen, maskinmeistari og sjómaður
- Tórur Mikkelsen, útróðrarmaður
- Karl A. Thomsen, fráfarin lærari
- Frits Thomsen, skipsførari
- Anfinn Huusgaard, skipari
- Jákup Jacobsen (Dungajákup), reiðari
- Zakaris Kristian Jacobsen, maskinmaður
- Michael Jacobsen, húsasmiðjur
- Líggjas Húsgarð, bóndi
- Ósbjørn Jacobsen, arkitektur
- Hanus Jacobsen, byggifrøðingur
- Sørin S. Djurhuus, fráfarin tilbúgvingarleiðari

Við til samrøðuna í fundarhølunum hjá Varðanum í Syðrugøtu hevði eg spurnarblað til allar 16 ættirnar, ið vanliga eru umtalaðar í bygdini:

- Er vindurin javnur ella ójavnur á ættini
- Er meira vindur í ættini enn aðrasteðs – ella øvugt
- Er ættin vát – t.e. regn, tá ið turt er aðrastaðni – ella øvugt
- Er hetta mjørkaætt?
- Er ættin vanliga ein góð ætt ella ein ring ætt – ber til at siga tað við fáum orðum?
- Onnur viðurskifti um ættina, søgur, fyribrigdi, hendingar o.s.fr.

Spurt varð somu spurningarnar ætt fyri ætt. Byrjað varð við norðan, og var farið allan kringin runt eystureftir, og steðgað var við heil- og hálv- og millumættirnar.

Spurningar og svar og aðrar viðmerkingar síggjast aftast í hesum skjali.




*Mynd 2: Tær 32 ættirnar. Til samrøðuna eru ikki allar 32 ættirnar brúktar, men onnurhvør - t.e. heil-, hálv- og millumættirnar.*

## Norðan

Liggur hann av norði, kemur hann oman av Gjáarfjalli (Tyrli).

Vindurin er javnur á ættini, tá ið vindferðin er lítil. Í nógvum vindi er strangar hvirlur uppií.

Tað er minni vindur í ættini, enn tað er fyri landið. Heiman fyri Nesið er stilli, tað drepur uppi, tá ið hann kemur fram við landinum og inn á sandin.

Ættin er vanliga turr, góð terraætt, tó svikalig móti kvøldi, men tað kann gott vera ælaveður.

Norðan er hvørki brim- ella mjørkaætt.

Norðan er altíð køld, men er ikki ein ring ætt í Syðrugøtu.

## Landnyrðingur norðan

Á landnyrðingi norði hoyrist lítið vil vind niðri í bygdini, men ovari í bygdini hoyrist vindurin væl. Í aðrar mátar er veðrið í Syðrugøtu á landnyrðingi norði, sum tá ið ættin er norðan.




*Mynd 3: Ímóti landnyrðingi norði.*

## Landnyrðingur

Tá ið hann liggur av landnyrðingi, kemur hann av Stórugjógv inn á Syðrugøtu.



*Mynd 4: Ímóti landnyrðingi*

Landnyrðingur er góð ætt í Syðrugøtu – besta ættin í bygdini. Ikki nógvur vindur í ættin, og hann er javnur, fer suður ígjøgnum Leirvíksfjørð. Er nakað av vindi, kemur hann heim á hálva víkina, meðan tað kann vera stilli longur inni. Tí verður hon eisini nevnd konufólkaættin.

Ættin er ikki vát í Syðrugøtu, men tað kann æla í nógvum vindi. Tá ið ælaveður er av landnyrðingi, kunnu ælingingar fara suðuru ígjøgum Leirvíksfjørð og koma inn á hálva víkina. Teir sleppa ikki longur inn, tí lotið oman ígjøgnum dalin (*Gøtudal*) steðgar teimum.

Mjørki er ikki á landnyrðingi í bygdini ella á víkini. Mjørkabrúgvin sæst viðhvørt eystan fyri oyggjarnar, men tað er klárt innanfyri.

Tað er ikki brim á landnyrðingi, men tung alda merkist, og tað kann vera trongd í sjónum.

## Landnyrðingur eystan

Veðrið í Syðrugøtu, tá ið hann er landnyrðingur eystan, líkist veðrinum á landnyrðingi meiri enn av eystri.

## Eystan

Tá ið hann liggur av eystri, kemur lotið heim eftir víkini av Gøtunesi.

Eysturættin er góð vindætt í Syðrugøtu.

Tað er nakað tað sama av vindi sum aðrastaðni, og hann er toluliga javnur. Tað eru sjáldan hvirlur á ættini.

Eysturættin er rálig – ráari enn vesturættirnar. Hon er eingin sólætt, og tað er einki serligt fjallveður. Liggur hann leingi av eystri á sumri, endar tað ofta við mjørka.

Tað er vátt, tá ið hann liggur av eystri – hon er regnætt. Líkist landsynninginum, sum er nærmasta slekt. Til regn ella mjørka er hon keðilig í Syðrugøtu, og hann kann liggja leingi um summarið.

Eystan er ikki brimætt.

## Landsynningur eystan

Veðrið á landsynningi eystri líkist veðrinum á landsynningi. Tað kann gott vera brim á ættini.



*Mynd 5: Ímóti landsynningi eystri*

## Landsynningur

Tá ið ættin er landsynningur, kemur hann javnur heim eftir víkini fram við landi frá Mjóvanesi.



*Mynd 6: Ímóti landsynningi*

Á landsynningi er vindurin javnur – javnasta ætt í Syðrugøtu – men hann er gjøgnumtreingjandi.

Vindferðin er tann sama, sum hon er aðrastaðni.

Landsynningur er vátasta ættin í Syðrugøtu. Tað regnar líka illa sum á hinum ættunum tilsamans. Hóast vátt og ófantaligt, so er hon jøvn, til hann støkkur vesturum.

Tá ið sjóvarfallið vendir suðuri í havinum, byrjar tað ofta við einum lítlum æli, so er turt eina løtu, til hann loysir og oysir niður.

Landsynningur er mjørka- og brimætt í Syðrugøtu. Ringasta brimættin í bygdini.

Yvirhøvur er landsynningur ein góð ætt í Syðrugøtu.

## Landsynningur sunnan

Tá ið hann kemur av landsynningi suðuri, kann nógvur vindur koma heim við landi, men einki brim er í Syðrugøtu. Tað fer upp á land norðan fyri Nesið.

## Sunnan

Fær Borðoyarnes í hampuligum veðri á sumri ein hatt – eina snøgga húgvu – er ættin beinur sunnan. Veksur hatturin norðureftir ímóti Borðoyarneshálsi, og er ikki so snøggur meir, er hann farin í landssynning sunnan, ella eina striku eystur um sunnan.



*Mynd 7: Ímóti suðuri*

Tá ið hann er sunnan í góðum veðri, liggur hann úr Kullu, og skáar úti við Løgdalsá. Tá er ikki nógvur vindur í Syðrugøtu.

Tá ið nakað av vindi er, kann vera nógvur vindur í Syðrugøtu. Hann kemur malandi heim. Í illveðri koma glaðurnar heim á sandin.

Sunnan er ein vát ætt, men eysturættin er vátari.

Sunnan er ikki brimætt. Tað kann vera mjørki, men ikki líka nógv sum á landsynningi.

## Útsynningur sunnan

Veðrið á útsynningi suðuri líkist veðrinum á útsynningi.

## Útsynningur

Útsynningur strekkir norður við landinum.



*Mynd 8: Ímóti útsynningi.*

Útsynningur er ójavnur, tá ið tað er nakað av vindi, líkasum ættirnar báðumegin útsynning, og tá er meira vindur í Syðrugøtu, enn tað er í landinum annars. Millum hvirlurnar kann vera stilli, men so brestur á aftur. Tað dunar í fjøllunum.

Í býlinginum ovast í bygdini eru ikki hvirlur, tá ið hann er sunnan.

Í góðum veðri á sumri er útsynningur ein góð ætt.

Útsynningur er ein vát ætt í Syðrugøtu, men mest ælaveður. Í hoyna mátti hoyfólkið altíð vera til reiðar at raka saman.

Á útsynningi er ikki mjørki ella brim.

Útsynningur kann vera góð ætt um summarið, men keðilig um veturin.

## Útsynningur vestan

Veðrið á útsynningi vestri líkist veðrinum á útsynningi.

## Vestan

Tá ið hann kemur av vestri, kemur lotið oman av Fjalli.



*Mynd 9: Ímóti vestri*

Tá ið ættin er vestan, er vindurin ójavnur, serliga í ringum veðri. Tá er meiri vindur, enn tað er í landinum annars. Í illveðri hava hvirlur verið niðri í bygdini sum úr byrsukjafti, og vindeygu eru sogin úr húsi.

Í vanligum veðri er vindurin ikki so ójavnur, og tað er turt og klárt.

Vestan er ikki ein vát ætt, tann turrasta ættin um summarið.

Mjørki er ikki á vestri og heldur ikki brim.

Vestan er sum útsynningur – góð góðveðursætt, men ring illveðursætt.

## Útnyrðingur vestan

Veðrið í Syðrugøtu, tá ið ættin er útnyrðingur vestan, er sum á útnyrðingi.

## Útnyrðingur
Tá ið hann kemur av útnyrðingi, kemur lotið oman ígjøgnum Gjódal og strekkir víkina úteftir.

Útnyrðingur er ein kaldur, og vindurin kann vera ójavnur.

Útnyrðingur kann vera harðligur, men hann er skjótur eftir sær. Í illveðri hevur onkur skaði verið á útnyrðingi og útnyrðingi vestri, tá ið hann kemur oman gjøgnum Mataránna, sum er tann norðara áin.

Ættin er ikki roknað sum vát í Syðrugøtu, men tað kann æla – og tað kann koma brádliga.

Eingin mjørki ella brim eru á útnyrðingi.

Útnyrðingur er sum vestan og útsynningur – góð góðveðursætt, men ring illveðursætt.

## Útnyrðingur norðan
Tá ið hann ælar av útnyrðingi norði, kemur hann ikki oman, men ger alt av sær ovarlaga í bygdini. Kann vera svart í mjørka í Norðragøtu, meðan tað er sólskin í Syðrugøtu.